# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Holbrooke gav Karadzic lyfti um, at hann verður ikki tikin og revsaður fyri síni krígsbrotsverk*

*(Charles Ingrao)*

# Skálaðu fyri friði



*Roh Moo-hyun og Kim Jong-Il skála við sjampanju í Pyongyang í morgun. Ein tílík mynd var óhugsandi fyri bara fáum árum síðani*

**Tað var ein søgulig sjón, tá leiðararnir í Norðurkorea og Suðurkorea skálaðu fyri varandi friði millum londini**

Formliga er kríggið millum tey bæði koreonsku londini í fimmtiárunum ongantíð endað, men nú, góð 50 ár eftir krígslok, hava leiðararnir í londunum báðum givið hvør øðrum lógvatak um at virka fyri varandi friði og at beina burtur tað seinasta markið frá Kalda krígnum.

Teir seinastu dagarnar hava suðurkoreanski forsetin, Roh Moo-hyun, og norðurkoreanski leiðarin, Kim Jong-Il, tingast í norðurkoreanska høvuðsstaðnum Pyongyang. Úrslitið gjørdist ein felags yvirlýsing, sum teir báðir skrivaðu undir, og sum bleiv almannakunngjørd í morgun.

Í yvirlýsingini stendur, at tey bæði londini eru samd um at virka fyri varandi friði, og tey skjóta upp, at USA, Kina og tey bæði koreonsku londini skulu halda ein toppfund, sum endaliga skal enda Koreakríggið.

Yvirlýsingin sigur eisini, at Norður- og Suðurkorea eru sinnað at økja búskaparliga samstarvið sínamillum, og at tey eru samd um at skipa góðsflutning um markið. Í gjár játtaði Norðurkorea at sleppa sínum kjarnorkuætlanum, og Suðurkorea hevur lovað landinum alla neyðuga hjálp í tí arbeiðinum.

# Amerikanarar lótu Karadzic sleppa

**Radovan Karadzic, sum er eftirlýstur fyri krígsbrotsverk í Bosnia, hevur fingið lyfti um, at hann verður ikki tikin. Lyftið fekk hann frá USA**

Tað skrivar ein amerikanskur søgufrøðingur, sum hevur staðið á odda fyri einari stórari verkætlan, sum hevur til endamáls at lýsa tað, sum hendi í gamla Jugoslavia fyrst í nítiárunum.

Krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia hevur sóknast eftir Radovan Karadzic seinastu tólv árini, og hóast NATO-hermenn hava gjørt fleiri royndir at fáa fatur á honum, er hann ikki tikin enn. Men sambært amerikanska søgufrøðinginum Charles Ingrao er tað ikki so løgið. Sambært honum hevur Karadzic fingið lyfti um, at hann verður ikki tikin.

- Ein týðandi kelda í amerikanska uttanríkisráðnum hevur greitt okkum frá, at Karadzic fekk eitt tílíkt lyfti frá amerikanska friðarsemingsmanninum Richard Holbrooke, sigur Charles Ingrao við danska útvarpið.

Holbrooke hevur avsannað, at hann gav Karadzic eitt tílíkt lyfti, men keldan í uttanríkisráðnum í Washington skal hava greitt frá, at lyftið um grið var eitt krav frá Karadciz aftur fyri at halda seg burtur frá bosniskum politikki, og at Richard Holbrooke valdi at taka av.

Danska tíðindakvinnan Florence Hartmann, sum hevur arbeitt fyri krígsbrotsmannadómstólin í Haag, umrøður ta loyviligu avtaluna millum Holbrooke og Karadzic í einari bók, sum hon gav út herfyri.



*Radovan Karadzic er eftirlýstur fyri grov krígsbrotsverk í Bosnia, men enn er hann ikki tikin*

## STUTT SAGT

### Fleiri tikin í Burma

Í morgun sóust trygdarhermenn ganga hús úr húsi í størsta býnum í Burma, Rangoon, og eygnavitni ivast ikki í, at teir leitaðu eftir fólki, sum vóru við í mótmælisgongunum herfyri. Tær seinastu næturnar hevur útigongubann verið í Rangoon, og keldur siga, at hesar næturnar hava trygdarhermenn tikið fleiri fólk og set tey í varðhald. Eitt eygnavitni segði við fronsku tíðindastovuna AFP í morgun, at fleiri fólk vórðu tikin í nátt.

### Gorbatjov hartar USA

Fyrrverandi sovjetski forsetin Mikhail Gorbatjov heldur lítið um mannagongdina hjá USA í bardaganum ímóti altjóða yvirgangi. Í gjár var Gorbatjov á vitjan í amerikanska statinum Kentucky, og har segði hann millum annað, at tað er skrivt bara at brúka stríðsvognar og rakettir í bardaganum ímóti yvirgangi. Fyrrverandi sovjetski leiðarin segði, at tað er eisini neyðugt at loysa teir grundleggjandi trupulleikarnar, sum gera, at fólk verða yvirgangsmenn.

### Ukraina skyldar einki

Russland og Ukraina eru aftur farin at keglast um gassveitingina úr Russlandi til Ukraina. Fyri nøkrum døgum síðani kunngjørdi russiska gassfelagið Gazpron, at tað fór at steingja leiðingina til Ukraina, tí tað átti pengar til góðar hjá almenna ukrainska orkufelagnum, sum eitur Naftogaz. Sambært russiskum keldum er talan um næstan sjey mia. krónur. Men ikrainski forsetin, Viktor Jusjtjenko, segði í gjár, at Ukraina skyldar ikki Gazpron eitt oyra.